Dømi um framløguætlan í sjálvvalda evninum og dømi um prótvøkuspurning í kenda tilfarinum

1.3 Leisturin í fyrra partinum av prótvøkuni:

- Prótvtakarin hevur framløguætlanina við sær til prótvøkuna og kann styðja seg til hana, tó at hann ikki lesur alt upp orðarætt úr henni.
- Letur næmingur ikki framløguætlanina inn, fer hann til prótvøku uttan hesa at styðja seg til.
- Prótvtakarin fær 6-8 minuttir at leggja fram munnliga sítt sjálvvalda evnið við støði í framløguætlanini.
- Prótvtakarin kann hava sínar egnu viðmerkingar við til prótvøkuna, men ikki er loyvt at lesa beinleiðis upp úr teimum.

Dømi um framløguætlan
Skúli: Eysturskúlin
Lærugrein: Samfelagsfrøði
Navn: Bárður Bárðarson
Flokkur: 9. á
Yvirskipað evni: Politikkur
Sjálvvalt evni: Politisk ungmannafeløg í Føroyum

2.Yvirskipað evni: Politikkur

3.Heitið á sjálvvalda evninum: Politisk ungmannafeløg í Føroyum

4.Grundgeving fyri, hví evnið er valt:

- *Persónligur áhugi í politikki*
- *Eri sjálvur í politiskum ungmannafelagi*
- *Týdningur at ungfólk eru í politikki*

5. Høvuðspunkt og øki í framløguni

A. Søgan um politisk ungmannafeløg:

- *Hví politisk ungmannafeløg spruttu fram*
- *Hvønn týdning feløgini fingu fyri flokkin*
- *Hvønn týdning feløgini fingu fyri føroyskan politikk*

B. Týdningurin av politiskum ungmannafeløgum í Føroyum í okkara samtíð og framtíð

- *Hvussu støðan hjá ymisku ungmannafeløgunum er í dag - á hvønn hátt verða tey hoyrd og vird?*
- *Hvussu eitt ungmannafelag kann ávirka førda politikkin og samfelagið sum heild.*
- *Tørvurin á ungmannafeløgum í framtíðini*

5. Keldulisti:

- "Nú er tann stundin..." (Hans Jacob Debes)
- Samrøður við formannin í Sosialistisk Ung, Unga Tjóðveldi, HUXA....
- Blaðgreinin, ”……..” í Sosialinum (20.11.2014)....
- Dokumentarsendingin: "Jóannes Patursson" (KVF 2016)
- **……..**
- **.....**

2. Prótøkuspurningur úr kendum tilfari

2.1 Leisturin í seinna partinum av prótøkuni:

- Samtala millum prótøkara og prótøhoyrara, sum við støði í prótøkuspurningunum knýtir seg til tekst og keldur úr skjalfestari undirvísingargongd í 9. flokki.
- Samtalan tekur støði í prótøkuspurningi úr kendum tilfari, sum prótøkarin fær við lutakasti beint eftir, at fyrri prótøkuparturin er av.
- Prótøkarin fær onga fyrireikingartíð.
- Seinni parturin av prótøkuni er 5-7 minuttir.
- Prótøkuspurningur skal verða úr øðrum yvirskipaðum høvuðsevni enn tí, sum prótøkarin hevur valt at hugsavna seg um í sjálvvalda evninum.
- Prótøhoyrari og prótødómari kunnu seta dýpandi spurningar.

Prótøkuspurningurin skal vera kveikjandi, og hann skal hava týðiligt samband við skjalfesta undirvísingargongd.
Prótøhoyringin fer fram innan fyri teir karmar, ið prótøkuspurningurin setur. Prótøkari og prótøhoyrari kunnu taka onnur viðkomandi evni upp í samtaluna og gera samanberingar og metingar.

2.2 Prótøkuspurningurin í kenda tilfarinum skal:

- Vera greitt orðaður.
- Hava samband við eitthvørt høvuðsevni úr undirvísingini í 9. flokki.

- Vera á hóskandi torleikastigi og á 2-3 ymiskum torleikastigum, sum rúma hóskandi, tillagaðar avbjóðingar til prótvakaran.
- Prótvtøkuspurningarnir skulu endurspegla mentanar- og samfelagsviðurskifti í Føroyum. T.e., at teir skulu fevna um somu temu, sum undirvísingin hevur fevnt um.
- Prótvtøkuspurningurin skal vera prótvakaranum ókendur. Prótvtøkuspurningarnir skulu vera fjølbroyttir og fevna um øll temu og allar undirvísingargongdir í 9. flokki, ið eru skjalfestar.

Dømi um prótvtøkuspurning úr kendum tilfar:
Sosiologi:

1) Hvussu vilt tú lýsa hugtakið *alheimsgerð?*
2) Hvussu sært tú demografiskar broytingar og alheimsgerðina (globaliseringina) í føroyska samfelagnum?
3) Hvørjar eru avbjóðingarnar hjá føroyskum myndugleikum viðvíkjandi hesum broytingum?